Leif Høj, stjóri á sølufyritøkuni, Fofish í Runavík:

# – Russiska skipið »ventilur« fyri smáan upsa

**Russiska skipið, sum sølufelagið, Fofish í Runavík, hevur leigað til frysting av smáum upsa, liggur nú við oljubryggjuna í Saltangará**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hetta er russiska skipið, sum Fofish í Runavík hevur leigað til frysting av smáum upsa. Fofish selir nevniliga veiðina hjá trimum reiðaríum, sum tilsamans hava fleiri trolarar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað tók sína tíð, áðrenn skipið kom inn á Skálafjørðin, og sambært Leif Høj, stjóra á Fofish, hava onkrir trupulleikar nú eisini verið við frystarínum umborð.

Mánamorgunin lógu Smaragd og Safir landingarklárir hjá P/F Beta. Teir høvdu fult skip, eini 240.000 pund av upsa.

Leif Høj segði seg vóna, at russiska skipið fór at verða klárt at taka ímóti, soleiðis at ein partur av veiðini hjá hesum báðum skipunum kundi frystast umborð.

– Menn eru umborð á russaranum og arbeiða við frystiskipanini, og vit vóna, at klárt verður at taka ímóti í dag, segði hann, tá ið vit høvdu hann í telefonini mánamorgunin.

Russiska skipið kann frysta 25 tons um samdøgnið av avhøvdaðum upsa.

Ábraham Løkin, sum er hin stjórin á Fofish, segði í samrøðu við Sosialin í síðstu viku, at fiskurin verður skildur hjá P/F Beta í Saltangará og síðan koyrdur umborð á russaran, har hann verður avhøvdaður, áðrenn hann verður frystur.

Sambært fyribilsloyvinum, sum Fofish hevur fingið frá landsstýrinum, skal bert upsi frystast umborð á russaranum, sum vigar 1,5 kilo ella minni. Hetta er upsi 4 og upsi 5. Ein treyt, sum landsstýrið eisini hevur sett, er, at fiskurin skal bjóðast út á uppboðssølu.

### Ein ventilur

Vit spurdu Leif Høj um 25 tons um samdøgnið ikki er ein lutfalsliga lítil nøgd, tá ið hugsað verður um allan upsan, sum kemur upp á land - at hesin er so smáur, og at so fáir keyparar eru til hendan fiskin, tí so lítið fæst burtur úr honum.

Og so er prísurin eisini hareftir.

Stjórin sigur, at Fofish hevði ein størri bát í boði, sum kann frysta 50 tons um samdøgnið, men felagið valdi í fyrstu syfti ikki at taka av, men heldur halda seg til hetta skipið.

– Russarin kann frysta eini 300.000 pund um vikuna, og vit halda, at tað er ein passalig nøgd til hesa roynd, sigur hann.

Leif leggur dent á, at ætlanin ikki er at taka nakað frá nøkrum við hesi royndini, men at hetta er ein roynd at fáa selt tann smæsta fiskin, sum føroysku virkini ikki vilja hava.

– Vit kunnu siga, at hetta er ein roynd, ið skal virka sum ein "ventilur", har møguleikar eru at geva ein betri prís fyri tann smæsta fiskin, sigur hann.

Ábraham Løkin segði í samrøðu við Sosialin í síðstu viku, at fiskurin, sum verður frystur umborð á russiska skipinum, verður seldur á russiska marknaðinum - og etin í Ruslandi. Hann kemur tískil ikki inn aftur á evropeiskar marknaðir í kapping við eitt nú føroyskan upsa.

# Kollafjord Pelagic frystir eisini upsa til útflutnings

**Tað er ikki bara sølufelagið Fofish í Runavík, sum frystir upsa til russiska marknaðin, nú upsin er so smáur, og prísurin í Føroyum er so ógvuliga lágur. P/F Miðalsbrekka í Vestmanna fær góðar 4 krónur fyri kilo av upsa, sum avhøvdaður og frystur vigar umleið 1 kilo. Hetta er nettoprísur, sum er nógv betri prísur enn skipini fáa frá føroysku fiskavirkjunum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*P/F Miðalsbrekka í Vestmanna, sum hevur trolararnar, Vestmenning og Fram, hevur gjørt avtalu við felag um sølu av smáum upsa til Ruslands. Fiskurin verður frystur hjá Kollafjord Pelagic og fluttur av landinum við russiskum frystiskipi*

P/F Miðalsbrekka, sum Tummas Christophersen í Vestmanna eigur, er eisini farið undir at frysta upsa til útflutnings.

Felagið hevur gjørt avtalu við felag, sum í fyrstu atløgu hevur útvegað teimum ein sáttmála í Ruslandi upp á tilsamans 750 tons. Somuleiðis er avtala gjørd við Kollafjord Pelagic um frysting av fiskinum - og skiljing, um tað verður neyðugt.

Upsin, sum skipini fáa, er so smáur, og á seinasta túri hjá Vestmenningi og Fram, sum felagið hevur, var als ikki neyðugt at skilja fiskin.

Skipini hava landað fyrstu ferð í Kollafirði, og tey eru úti aftur á øðrum túrinum, síðan Miðalsbrekka gjørdi hesa avtalu.

Fiskurin verður avhøvdaður umborð á skipunum og verður síðan landaður á Kollafjord Pelagic.

Sum skilst, hevur virkið í Kollafirði ætlanir um at seta upp avhøvdarar, um hetta í framtíðini verður ein partur av virkseminum hjá felagnum.

Ætlanin hjá Miðalsbrekku er at frysta tann smáa upsan og síðan at selja tann størra fiskin til eitt nú Føroya Fiskavirking.

Avtalan er, at russiskt skip kemur eftir fiskinum, sum síðan verður fluttur yvir til Ruslands og seldur á russiska marknaðinum.

### Góður prísur

Sosialurin hevur frá álítandi keldu fingið at vita, at prísurin fyri upsan, sum avhøvdaður vigar umleið eitt kilo, er 5,80 krónur fyri kilo, brutto. Tá ið útreiðslur til pakking, frysting og flutning eru farnar burtur av, eru meira enn 4 krónur eftir av hvørjum kilo ella neyvari helst 4,20-4,30 krónur. Hetta er munandi meira, enn reiðaríini fáa fyri upsa 4 í Føroyum.

Sosialurin veit um eina sølu í Føroyum nú um dagarnar, har reiðaríið bert fekk 2,50 krónur fyri kilo fyri upsa 4 og bert 1 krónu fyri kilo av upsa 5.

Tað var Føroya Fiskavirking, sum keypti fiskin.

Fiskaseljarar siga, at Føroya Fiskavirking klárt hevur meldað út, at felagið einki vil hava við upsa 5 at gera.

– Hetta er væl skiljandi, tí einki fæst burtur úr hesum fiskinum, tá ið hann er so smáur, siga teir.

Sum skilst, hava virkini, sum framleiða portiónir úr upsa, tann trupulleika, at fiskurin er ov smáur til portiónirnar, og tí er hann so ringur at selja fyri líkinda prís.

## Baksíðan á "medaljuni"

**Nú feløg eru farin undir at frysta smáan upsa, sum seldur verður til Ruslands, er nærliggjandi at hugsa sær, at skipini í størri mun enn áður fara at leggja seg eftir at fylla lastina við smáum fiski**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At føroysku virkini ikki megna at keypa og virka tann smáa upsan, sum skipini fiska, og selja hann av aftur landinum fyri ein líkinda prís, kann tykjast sum eitt "sjúkueyðkenni". Um hetta er so, duga vit ikki at meta um, men spell er tað, at fiskurin ikki skal koma til sættis í Føroyum og verða við til at skapa tað arbeiði á virkjunum kring landið, sum brúk er fyri, nú minni toskur kemur upp á land.

Tað ber í longdini ikki til hjá nøkrum skipi ella fiskimanni at fiska upsa, sum verður seldur fyri 2,5 krónur ella 1 krónu fyri kilo.

Hetta er eingin prísur - og als eingin prísur fyri tað stríð, sum tað er hjá manningini at standa við kryvjipavnarnar uppi í heili samdøgur.

Tað er tí gleðiligt, at fiskurin, sum føroysku virkini ikki síggja seg før fyri at keypa, kann seljast frystur í Ruslandi fyri hampiliga góðan prís.

Baksíðan á "medaljuni" er, at skipini, sum eru partur av gjørdum avtalum um frystan upsa, nú kanska í minni mun enn áður fara at royna at fáa fatur á tí størra fiskinum.

Hetta kann so aftur føra til, at so nógv verður tikið av smáum fiski, at stovnurin kemur í vanda - ikki minst, nú so lítið er at fáa av toski.

Vit kunnu bert vóna, at eisini veiðimaðurin dugir sær hógv og hugsar um hesi viðurskifti, tá ið langt verður út á hav.